


www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 10 - 2012

# Oljutyrla neyðlendi í øllum góðum

Eingin av oljuarbeiðarunum ella manningini fingu nakran skaða, tá ein tyrla mátti neyðlenda á havinum millum Hetland og Orknoyggjar fyrr í kvøld. Bjargingarbátar úr Lerwick, Kirkwall og Aith komu skjótt á staðið og tóku tey 19 fólkini umborð. Tríggjar tyrlur vórðu eisini sendar á staðið. Tað eydnaðist flogskiparunum at seta tyrluna á havið nærhendis einum tangaskipi, sum var í økinum. Manningin sigur, at tað var einki minni enn eitt bragd sum flogskipararnir gjørdu. Tyrlan flýtur framvegis. Sambært blaðnum Herald Skotland eru fleiri skip á leiðini og royna at bjarga neyðlendu tyrluni, sum var ávegis úr Aberdeen til boripallin West Phoenix, sum arbeiðir fyri Total 140 km. vestan fyri Hetland. Veðrið var gott í økinum, tá tyrlan neyðlendi. Tyrlan hevur verið brúkt av Canadian Holding Company, CHC og er av slagnum Eurocopter AS332 eisini kent sum Super Puma. CHC hevur 36 av slagnum, sum arbeiða kring heimin. Hetta er triðja tyrluóhappið í bretskum øki seinasta árið. Fyri stuttum vórðu 14 mans bjargaðir, tá ein líknandi tyrla neyðlendi í øllum góðum. Men undan tí doyði fleiri oljuarbeiðarar, tá enn ein tyrla datt niður.